

www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 10 - 2011

# Okkum tørvar kjak um oljuna

Tað tykist mær løgið, at lítið ella onki alment kjak er um oljuspurningar eitt nú um inntøkurnar frá eini slíkari vinnu. At eitt fund av týdningi fer at hava ávirkan á samfelagið, er neyvan nakað at ivast í, skrivar Eyðun Waagstein úr Tórshavn í hesum fyrsta innlegginum í nýggja táttinum á oljan.fo, sum hevur fingið stutta og greiða heitið - OLJUKJAK. Øll eru vælkomin at senda sínar hugsanir og spurningar til Oljukjak á oljan.fo til hesa telduadressuna - jan@foib.fo. Vit geva orðið til Eyðun Waagstein í hesum fyrsta umfarinum. Eru vit fyrireikað til oljuinntøkur? Um eitt hálvt ár ella so fara nøkur av heimsins størstu oljufeløgum at gera eina sera kostnaðarmikla roynd afturat at finna olju í føroyskum sjóøki. Tá so nógv orka og so nógvur peningur verður brúkt til hetta, so er tað tí, at feløgini trúgva uppá, at hetta fer at kasta av sær, nú ella seinni. Hvussu eru vit fyrireikað til møguligar inntøkur frá eini oljuvinnu? Eiga vit at seta eitt alment oljufelag á stovn? Hvussu skulu inntøkurnar koma samfelagnum til góðar, uttan at koyra alt um koll í einari eksplosión av kostnaðarvøkstri? Hvussu er skipað viðv. inntøkum beinleiðis í landskassan? Hvussu skal hetta umsitast? Skulu vit leggja til viks til at standa ímóti við, ella skulu vit lata standa til? Eru lógir og reglugerðir dagførdar? Tað tykist mær løgið, at lítið ella onki alment kjak er um evnið. At eitt fund av týdningi fer at hava ávirkan á samfelagið, er neyvan nakað at ivast í. Hvør leggur til brots í einum kjaki? Er tað vinnan ella tað almenna? Hvør samlar træðrirnar? Tórshavn 23. september 2011 Eyðun Waagstein